

*Nú hava Beinta og børnini, níggju ára gamla Annika og lítla Bjørg fingið fót undir egið borð. Her eru tær í vakra urtagarðinum við Hoyvíksvegin*

samstundis læknan, sum hevði kannað Ova. Vit kendust og høvdu arbeitt saman, so eg spurdi, um eg ikki kundi sleppa at síggja myndirnar, sum hann hevði tikið av manninum. Tá fekk ein stóran skelk, tí lungnamyndirnar vóru so ræðuligar, at eg ivaðist í, um nakað var at gera.

- Tað var so løgið, at eg ikki dugi at siga frá, hvussu tað kendist – fyrst at hava fingið góð boð um barnsburðin og so í sama mundi at fáa skelkandi vitanina um mann mín. Eg fór óglað heimaftur og kendi meg púra hjálparleysa, men eg segði einki fyri Ova, um at eg hevði sæð myndirnar.

- Vit gjørdu skjótt av, seldu hotellið og fóru til Danmarkar, tí Ove helt, at danska sjúkrahúsverkið hevði størri møguleika at hjálpa honum.

- Tá vit komu til samtalu á sjúkrahúsinum í Herning, higar vit vóru flutt, og Ove hevði verið til kanningar, legði eg til merkis, at læknin var illa við, tá hann sá, at eg var við barn. Mín hugsan var beinanvegin, at vit ikki fóru at fáa góð boð. Læknin segði eisini, at einki var at gera, og at Ove bert hevði hálvt til eitt ár eftir at liva.

## Doyði tveir mánaðar seinni

- Hetta var í januar 08, og í oktober sama ár andaðist Ove. Tá var lítla Bjørg fødd og tveir mánaðar gomul.

- Tað var tó ein uggi, at Ove var hjástaddur, tá eg átti, men tað gekk kortini ikki upp fyri mær, at hann skuldi doyggja. Hann hevði øgiliga sterkan persónleika, og hóast eg sá, hvønn veg tað bar, so vildi eg ikki við mær sjálvari ásanna, at hann ikki fór at liva.

- Beinta situr hugsunnarsom lítla løtu og sigur stillisliga: Sorg er eitt løgið fyribrigdi og við hvørt eitt sindur sjálvsøkin. Eg hugsi, at tað bert er væl, at hann slapp, av tí at tað var einki lív eftir hjá honum. Síðani sigur hon brosandi: Lítla Bjørg líkist so nógv pápa sínum, bæði í útsjónd og verumáta. Tað er sum at hava ein part av honum eftir, sigur Beinta Laursen.

- Í juli mánaði í fjør komu Beinta og børnini heim til Føroya. Tað var so heppið í øllum tí dapra, at hon fekk starv í Havn og eisini eitt stað at búgva.

- Tað at koma heim var so ótrúliga gott fyri okkum tríggjar. Her hava vit ommur og abbar, sum taka hond um okkum og hjálpa so ómetaliga væl. Hóast Anniku leingist til Grønlands, har hon hevur livað sítt lív, so er hon glað fyri skúlan her og fyri at sleppa í Havnardal við abbanum ella bara at taka telefonina og ringja til ommu. Hennara størsti áhugi er at sita á rossabaki, og sum hon segði nú ein dagin: Tað er deiligt í Føroyum. Tað er tekin um, at hon trívist, sigur Beinta og leggur aftrat: - Hetta hevur verið ein long ferð, ja ein sigoynaraferð, tí vit hava flutt so ofta, bæði millum londini og í Grønlandi.

## Vit eru komnar heim

Vit sita í vakra urtagarðinum á Hoydalsvegi , og Beinta lítir hugagóð kring seg og sigur: Hetta er mítt, og nú vóni eg bert, at eg og børnini finna friðin, so sárini kunnu lekjast, og ikki minst, at einki óvanligt hendir aftur í okkara lívi. Harnæst at mítt arbeiði fer at hilnast, sigur Beinta Laursen.

- Nú havi eg fingið dreymin uppfyltan um at stovna egið virki. Húsini eru í fýra hæddum og innrættað við stórum ljósum rúmum og atgongd fyri fólki í koyristóli og tílíkum. Umframt vanliga fysioterapi havi eg serliga royndir at arbeiða við sjúklingum, sum hava havt blóðtøppar ella heilabløðing og vóni, at eg fái brúk fyri mínum royndum á hesum øki, sigur Beinta.

- Um tað at koma heimaftur eftir 15 ár í útlegd, sigur Beinta Laursen:

- Tað er so hugaligt at koma heimaftur, bert tað at ganga gjøgnum býin, hitta kend fólk og fáa eitt prát. Tó er ein broyting hend hesi árini, eg havi verið burtur.

- Fólk hava nógv meir um oyruni nú enn áður. Tað merkist, at fólk eru strongd. Eitt nú siga fólk, eg hitti, at tey hava ringa samvitsku av ikki fáa í lag, at vitja meg.

- Tað er kortini ikki so løgið at fólk eru strongd, av tí at bæði børn og vaksin hava so nógv at fara til. Eg eri bilsin av, hvussu nógv tiltøk eru um dagarnar, bæði fyri børnum og vaksnum. Tað er ógjørligt hjá teimum flestu, sum hava arbeiði og familju, at røkka til, um tey skulu fara til øll hesi tiltøkini. Soleiðis var ikki, áðrenn eg fór avstað, tí tá vóru so fá tiltøk at fara til, at øll høvdu stundir at luttaka, sigur Beinta Laursen.